# Veljarin skal ikki ivast

**Javnaðarflokkurin legði týsdagin fram valskrá sína fyri fjølmiðlunum. Av tí at okkurt tekniskt mistak var í greinum í blaðnum í gjár, tríva vit aftur í málið**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*


*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins á tíðindafundinum týsdagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Javnaðarflokkurin ætlar í valstríðnum at gera púra greitt fyri veljaranum, hvørji mál flokkurin undir øllum umstøðum fer at arbeiða við í eini komandi samgongu. Flokkurin legði í týsdagin fram valskránna, har flokkurin bindir seg til at gera ávísar íløgu, t. d. at útvega 160 dagrøktarpláss, at leingja barnsburðarfarloyvi úr hálvum upp í eitt ár – við løn, at økja fólkapensjónina munandi o. s. fr.

Við Sosialin í gjár segði Jóannes Eidesgaarde, floksformaður, at hesi vallyfti fóru at føra til eina beinleiðis útreiðslu fyri landskassan upp á 194 milliónir krónur. Men við tað, at ein partur av hesum kemur innaftur sum skattur og onnur avgjøld, so verður nettoútreiðslan 116 milliónir krónur.

– Hetta er lítið at rokna ímóti teirri øking, sum hendan samgongan hevur staðið fyri seinastu fýra árini, sigur Jóannes Eidesgaard, sum vísir á, at útreiðslurnar á fíggjarlógini eru øktar við 950 milliónum farnu fýra árini.

Sambært útrokningunum hjá Javnaðarflokkinum verða øktu útreiðslurnar býttar soleiðis komandi fýra árini í milliónum:
(sí talvu)

### Endin vantaði…

Eitt tekniskt mistak í blaðnum í gjár gjørdi, at endin hvarv í trimum av greinunum um valskránna hjá Javnaðarflokkinum, sum stóðu á síðu 16 og 17.

Í greinini »Vallyfti fyri 116 mió« vantaði hettar brotið:

»Javnaðarflokkurin ætlar eisini at styrkja samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Hetta førir sjálvandi til, at meira skal gjaldast í grunnin, og verður landssins partur sum arbeiðsgevari øktur við fimm milliónum um árið til 20 milliónir um fýra ár.«

Í høvuðsgreinini á síðuni vantaði hetta brotið:

»Flokkurin sigur, at øll skulu hava rætt til arbeiðsmarknaðarútbúgvingar. Í hesum sambandi vísti Hans Pauli Strøm, tingmaður, á tað neyðuga í, at skipað verður fyri útbúgvingarskeiðum fyri verkafólki, fyri at gera tey betur før fyri at røkja tað arbeiði, tey fáast við.

Á arbeiðsmarkanaðarøkinum leggur flokkurin eisini dent á eitt heilsugott arbeiðsumhvørvi.«

Og í greinini »Samveldissáttmálið millum Føroyar og Danmark« vantaði hetta brotið:

»Tað ber væl til at gera eina politiska avtalu, sum greitt definerar hesi viðurskifti og fær altjóðarættarligt gildi. Hendan politiska avtala bindir so danskar stjórnir og donsk fólkating, so leingi avtalan er galdandi, segði Jóannes Eidesgaard.«

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Røktarheim, íløgur | 20 | 20 | 20 | 20 |
| Røktarheim, rakstur | 15 | 30 | 45 | 60 |
| Alm. tænastur | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Barnsburðarfarloyvi | 15 | 30 | 45 | 60 |
| Systkinaavsláttur | 10 | 10 | 10 | 10 |
| Búpláss fyri brekað | 6 | 6 | 6 | 6 |
| Døgnrøktarskipan | 5 | 5 | 5 | 5 |
| Samhaldsfasti | 5 | 10 | 15 | 20 |
| Fólkapensjón | 0 | 5 | 10 | 10 |
| Sjúkrahús – bíðilistar | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Tilsamans brutto | 79 | 119 | 159 | 194 |
| Tilsamans netto | 47 | 71 | 95 | 116 |

# Fólkaflokkurin til val við treysti, trygd og trivni

**Í morgun fer Fólkaflokkurin at leggja fram valskrá sína fyri fjølmiðlum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*


*Anfinn Kallsberg fer saman við ting- og landsstýrismonnum, at leggja valskrá Fólkafloksins fram fyri fjølmiðlunum í dag*

»Treysti, Trygd og Trivini« verða slagorðini, sum Fólkaflokkurin fer at brúka í valstríðnum hesaferð. Flokkurin hevur boðið fjølmiðlum á fund í morgun, har valskráin hjá Fólkaflokkinum verður løgd fram. Tað verða Anfinn Kallsberg, løgmaður og fomaður Fólkafloksins, sum saman við løgtings- og landsstýrismanning floksins fara leggja skránna fram.

Javnaðarflokkurin legði fyri við síni valskrá fyrradagin undir slagorðinum »Fólkið fyrst«, har tey sosialu málini verða sett ovast á breddan, meðan sjálvstýrismálið kemur í aðru røð, hóast flokkurin leggur dent á at fáa málið loyst – helst í ár.

Í dag fæst so at vita, hvussu Fólkaflokkurin raðfestir sjálvstýrismálið. Bjarni Djurholm hevur í fjølmiðlunum víst á ein samveldissáttmála, so okkurt er sum bendir á, at sjónarmiðini hjá Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum líkjast.

Yvirtøkan hátíðarhildin:

# Dreymurin um ein betri skúla


*3. a ynskti sær skúladjór, sum skuldu fáa eitt stykki at ganga á, sum tey síðani skuldu skiftast um at passa*


*Í 7. a vildu tey hava kantinu, mikroovn, betri sangútgerð og annað. Tey vistu, hvat tey vildu hava*

**Sosialurin var og vitjaði tveir flokkar í Sankta Frans skúla í Havn í samband við yvirtøkuna av fólkaskúlanum, sum skúlar í Føroyum hava fingið boð um at hátíðarhalda. Dagurin var hátíðarhildin í gjár, 20. mars kring allar skúlar í Føroyum á ymsan hátt**

HÁTÍÐARHALD
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Á Sankta Frans skúla byrjaðu tey skúladagin í gjár við einum hóskandi morgunsangi, Boðar tú til allar tjóðir. Síðani helt skúlastjórin, Selmar Jacobsen, fyrilestur um skúlasøguna í fimleikahøll skúlans. Fyrilesturin snúði seg um millum annað nær fólkaskúlin kom til Føroya, nær tað varð loyvt at undirvísa á føroyskum í skúlanum, háskúlin í Føgrulíð í Klaksvík varð nevndur og eisini legði skúlastjórin dent á, hvat Sankta Frans skúli kann gera, fyri at fáa ein betri skúla.

– Lærararnir skipaðu so fyri sjálvir, hvussu teir velja at hátíðarhalda, greiðir Selmar Jacobsen frá. – Tað er upp til hvønn einstakan, hvussu nógv verður gjørt við yvirtøkuna.

Hvør skúli hevur fingið sent tilfar frá Mentamálastýrinum, sum kundi brúkast í sambandi við hátíðarhaldi.

– Skúlin hevur fingið sendandi gamlar lógir, kunngerðir og annað, men vit fingu ikki so væl brúkt tað. Víst varð eisini til skúlasøguna, og tað hava vit so brúkt, sigur Selmar.

### Betri umstøður

Inni í 7. a var lív í, tá trinið var um dyrnar. Tey høvdu saman við læraranum sett upp á eina talvu, hvat tey høvdu kunnað hugsað sær, soleiðis, at skúlin gjørdist ein betri skúli.

Á ynskilistanum stóð millum annað, at 7. flokkur vildi fegin hava enskt longu í triðja ella fjórða flokki, meðan tey vildu hava okkurt annað mál ístaðin fyri danskt. Tað kundi til dømis verið norskt, svenskt ella danskt, halda tey.

– So vilja vit eisini hava sofur á skúlanum, siga næmingarnir í 7. a. – Nógvir aðrir skúlar hava sofur til næmingarnar. Inniloyvið vilja vit eisini hava alt árið, tí tað er so keðiligt at hava inniloyvi bara frá jólum til páskir. Vit høvdu eisini kunnað hugsað okkum at fingið eini tveir tímar av týskum í sjeynda flokki og sloppið at havt fartelefonina í fríkorterinum.

Næmingarnir í 7. a vistu, hvat teir vildu. Betri sangútgerð, ein ella tveir el-gittarar, forsterkara. Teir hava fyri stuttum fingið eitt trummusett. Eisini høvdu teir ynskt, at tað var ein telda í hvørjari skúlastovu. Hetta tí um onkur skal skriva okkurt inn, so er tað lættari at sleppa framat eini teldu. Mikroovnur, ketil, salt og pipar stóð eisini á listanum hjá 7. a. Men um hetta ikki slær ígjøgnum, so kanska eina heila kantinu, tí tað hava allir skúlar í Norðanlondum, siga tey. So kundu næmingarnir goldið eina ávísa upphædd til skúlan hvønn mánaða, soleiðis, at tað var møguligt hjá teimum at fáa heitan mat hvønn dag.

### Skúladjór

3. a hevði eisini gjørt sær ein ynskilista. Á honum stóð millum annað, at tey kundu hugsað sær at havt eitt ella fleiri skúladjór.

– Vit kunnu hava eitt stykki til hønur, dunnur, hest og hundar og so kunnu vit skiftast um at passa tey, søgdu næmingarnir í triðja a. Og tað var eisini lag á manni at skula passa dýrini um vikuskiftini. Tað kundu tey bara eisini skiftast um at gera.

Tá vit spurdu næmingarnar í triðja flokki, hví tey sluppu at gera hetta í dag segði onkur, at tað var tí, at Selmar helt at skúlin var blivin so gamal, so hann helt, at nú skuldi hann gera okkurt.

Triði tími hvønn mikudag er floksins tími. Tá sleppa børnini sjálvi at gera av, hvat tey skulu gera. Um tey vilja spæla ella hugna sær. Í gjár var floksins tími útsettur ein tíma, tí Sosialurin kom at vitja, men børnini gleddu seg nógv at sleppa at spæla næsta tíman.



# Hátíðarhald í Klaksvík

**Mikudagin var føroyska yvirtøkan av skúlunum hátíðarhildin kring alt landið. Eisini skúlarnir í Klaksvík høvdu okkurt serligt á skránni hendan dagin**

HÁTÍÐARHALD
*Ragnhild Ellingsgaard*


*Freydis Poulsen helt ein fyrilestur um søguna hjá skúlunum frá byrjan av og til í dag*

**Klaksvík, Sosialurin:** Bæði Skúlin við Ósánna og Skúlin á Ziskatrøð høvdu skipað fyri fyrilestrum í samband við føroysku yvirtøkuna av fólkaskúlunum.

Skúlarnir høvdu heitt á Freydis Poulsen um at halda nakrar fyrilestrar um skúlaverkið í Norðoyggjum heilt frá byrjan av.

Freydis hevur í fleiri ár starvast sum lærari á Skúlanum við Ósánna, og harafturat hevur hon stóran áhuga í søgu. Hon hevur fleiri ferðir áður hildið fyrilestrar ymsastaðni um mangt og hvat í Klaksvíkar søgu.

Í fyrilestrinum greiddi hon millum annað frá søguni hjá skúlunum, samstundis sum hon eisini kom inn á umstøðurnar tá og nú.

Freydis byrjaði tíðliga mikumorgunin við at halda ein fyrilestur fyri framhaldsdeildini í Skúlanum við Ósánna, og seinni um morgunin hevði hon so eisini ein fyrilestur fyri framhaldsdeildini í Skúlanum á Ziskatrøð.

Heilt fitt av næmingum møttu upp til fyrilestrarnar, og í samband við hátíðarhaldið fingu teir allir frí, tá fyrilesturin var liðugur.


*Næmingarnir í Skúlanum á Ziskatrøð lurta eftir Freydis*

Klaksvíkar Tónleikafelag:

# Sjey 00

**- Á stovnandi aðalfundinum hjá Tónleikafelagnum skal navnið hjá felagnum millum annað góðtakast, sigur Gulli Johansen, formaður í tónleikafelagnum í Klaksvík**

TÓNLEIKUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík, Sosialurin:** - Uppskotið til navnið hjá Tónleikafelagnum er Sjey 00, verður úttalað sjeyhundrað sigur Gulli.

- Vit hava gjørt endamálsorðingina og reglugerðin er eisini gjørd, greiðir Gulli frá.

Tað er nú umleið ein mánaði síðani Tónleikafelagið bleiv sett á stovn. Og avgerð er tikin um, at ein stovnandi aðalfundur skal verða.

- Enn er dagfestingin tó ikki endaliga sett, tí ymisk viðurskifti skulu fáast í rættlag áðrenn. Millum annað hava vit ikki fingið eitt høli at hava fundin í, men tað kemur upp á pláss innan fyri ein av teimum komandi døgunum, sigur Gulli Johansen.

Ætlanin er eisini, at tann fyrsta konsertin hjá Tónleikafelagnum skal verða sama kvøldið, sum aðalfundurin hevur verið.

- Tað verða tveir bólkar úr Klaksvík, og so ætla vit at fáa í øllum førum ein afturat, sigur Gulli.

Hann sigur eisini, at áhugin millum fólk fyri felagnum er stórur.

- Fleiri hava spurt, hvussu tað gongur, og hvussu ein kann gerast limur, so tað er bara hugaligt.

### Høli – ein trupulleiki

Men sum við so nógvum øðrum í Klaksvík, er tann størsti trupulleikin at finna eitt hóskandi høli.

- Vit royna at liggja framvið, sigur Gulli.


*Leivur Vitalis, Ólavur Simonsen, Oddur Olsen, Louis Poulsen og Gulli Johansen.*
*Á myndini vanta: Jan Gardar og Hans Juul Nystrøm*

- Men tað er ótrúliga torført. Vit høvdu eitt í huganum, sum frammanundan hýsir nøkrum Tónleikabólkum, men tað hølið skal nú nýtast til Net- Kafé.

Hølið, talan er um, er Isenkram, har sum millum annað Norðoya Heimavirki heldur til.

Á heimasíðuni hjá Pop.fo var í gjár eitt uppskot um, at Tónleikafelagið kann fáa innivist í Studio Pegasus, men Gulli sigur, at tað kunnu tey ikki ganga út frá, tí at Pegasus hevur nógv virksemi, sum tey brúka sítt høli til.

- Men vónandi kundi man fingið onkra hjálp frá Pegasus at finna eitt hóskandi høli til okkum, sigur Gulli.

- Annars mugu vit bara royna at hava eygu og oyru opin, tá tað kemur til høli. Serliga um kommunan keypir okkurt, sigur Gulli Johansen, formaður í Tónleikafelagnum at enda.

Nevndin í Tónleikafelagnum hevur skipað seg soleiðis:
Gulli Johansen formaður
Leivur Vitalis næstformaður
Ólavur Simonsen skrivari
Jan Gardar kassameistari
Hans Juul Nystrøm nevndarlimur
Tiltakslimir eru: Louis Poulsen og Oddur Olsen.